# ÚTBJÓÐING

Í sambandi við vatnorkuútbyggingina hjá SEV verður við hesum arbeiðið at gera áarinntøk og veitir v.m. millum Skálá og Blásendi í Eysturoy boðið út í almennari lisitatión.

Talan er um 3 luftinntøk og 20 áarinntøk við tilhoyrandi veitum o.ø.

Eitt luftinntak og 5 til 7 áarinntøk skulu gerast í summar, meðan restin, 2 luftinntøk og 13 til 15 áarinntøk við veitum, skal gerast summarhálvuna 2012.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá LBF til í seinasta lagi 4. mars. Eitt veðhald á kr. 5.000,00 skal verða goldið á konto 6460 155 434 6 í Bank Nordik, áðrenn tilfarið verður útflýggað.

Tilboð, merkt **Inntøk til Eiði 2 Suður,** skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi 28. mars 2011 kl. 14:00. Tilboðini verða tá latin upp á skrivstovuni hjá SEV Landavegur 92, Tórshavn, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

Saman við tilboðnum skal fylgja :

1. Váttan frá banka/trygging um, at trygd uppá 15% av tilboðsupphæddini kann veitast.
2. Váttan um, at felagið ikki skyldar tí almenna pening.

**LBF** · Grønlandsv. 5 · 100 Tórshavn · 63 63 63 · lbf@lbf.fo

# TVINGSILS-SØLA

Týsdagin tann 12. apríl 2011, kl. 13.30, verður á Dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 133 b, Sandavágur.
Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at verða týsdagin tann 15. mars 2011, kl. 10.00 á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.
Ognin er ein vinnubygningur, eitt vakstrarhús á íalt 2.272 m2, gjørt av acryl, innrammað í stál á betonggrund.
Grundøkið er 3.972 m2 til víddar
Sølan er umbiðin av Óla Jákupi Kristoffersen, advokati, v/ Biritu S. Samuelsen, advokat fulltrúa, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail bss@jura.fo (j. nr. 20100957), ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsils-søluuppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

FÚTARÆTTURIN

Lesið **Sosialin** -tað loysir seg

Fíggjarmálaráðið

# 2 fulltrúar til Fíggjarmálaráðið

**Søkt verður eftir tveimum fulltrúum til Fíggjarmálaráðið, har tað eina starvið er tíðaravmarkað til 9 mánaðir fyri fulltrúa í barsilsfarloyvi**

**Størvini**
Fulltrúar í Fíggjarmálaráðnum arbeiða við einum fjølbroyttum úrvali av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

**Til dømis:**
- At ráðgeva landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og at viðgerða innkomin mál
- At fyrireika uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- At loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- At gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- At ráðgeva og leiðbeina aðalráðum og stovnum.

**Førleikar**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving sum búskaparfrøðingar og duga at arbeiða sjálvstøðugt við góðum samstarvsevnum við onnur.

**Vit bjóða**
- Sjálvstøðugt starv
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving
- Eitt starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Flex-tíð

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Freistin at søkja er 14. mars 2011 kl. 12.00. Størvini verða sett skjótast skjótast tilber, tíðaravmarkaða starvið verður tó sett frá 1. apríl 2011 at rokna.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmála-stjóra, á tlf. 35 20 20.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo. Teldupostadressan er fmr@fmr.fo

TRAÐAGØTA 39 · POSTSMOGA 2039 · FO-165 ARGIR · TEL: 35 20 20 · FAX: 35 20 25 · FMR@FMR.FO

# Landsfundur 2011

verður á Samljóð í Skopun
tann 26. mars kl. 10.00.

Skrá sambært viðtøkunum.
Uppskot til viðgerðar á landsfundinum skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. mars.

Øll sambandsfólk eru vælkomin

*Nærri verður lýst seinni*

**Landsnevndin**

Sosialurin 341800

**Sambandsflokkurin**

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

miðlahúsið í Vágsbotni

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO | Sosialurin

www.ebenezer.fo

# SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er hvønn sunnudag kl. 12.00
**Øll eru hjartaliga vælkomin!**



EBENEZER